FØROYA PEDAGOG FELAG

# Aðalfundur 2006

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Føroyum **leygardagin 18. februar 2006.**

**Skrá:** smb. viðtøkum felagsins

**Uppskot til aðalfundin** skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi **14. januar 2006** við skrivligari váttan frá viðkomandi uppskotsstillara.

**Formansval** Uppskot til formansevni skulu – smb. viðtøkum felagsins § 10 – skrivliga latast nevndini í seinasta lagi 15. januar 2006.

Saman við uppskotinum skal sendast skrivlig váttan frá viðkomandi, sum er í uppskoti um, at hon/hann vil taka við vali.

Valdur formaður bindir seg til at taka við fulltíðarstarvi í felagnum.

Uppskot skulu sendast til:

**Føroya Pedagogfelag**
Postsmoga 318
110 Tórshavn

**Nevndin**

---

**Fíggjarmálaráðið**

# Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum søkja eftir fulltrúum at seta sum skjótast. Lýsingin stóð í blaðnum 16. og 19. desember, og tú finnur eisini lýsingina á heimasíðunum www.fmr.fo og www.lnd.fo

Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Fíggjarmálaráðið**
Postboks 2039
FO-165 Argir

Freistin at søkja er *hósdagin 12. januar 2006 kl. 12.00.* (Freistin er longd eina viku).

Vilt tú vita meira um størvini, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra, á tlf. 352020 ella Snorra Fjallsbak, stjóra á Lønardeildini á tlf. 352200.

---

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

## Endurlýsing
# Ergoterapeutur

Ergoterapiin á psykiatrisku deild søkir eftir ergoterapeuti at byrja 1. februar 2006 ella skjótast tilber til og við 31. januar 2007 til okkara vælvirkandi toymi av ágrýtnum og positivum starvsfeløgum. Starvið er eitt farloyvisstarv á 35 tímar um vikuna.

**Um arbeiði**
Ergoterapiin viðgerð brúkarar frá øllum psykiatriskum deildum umframt ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini, og ergoterapeutarnir hava ábyrgdina av hvør sínari deild.

Vit kunnu bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum. Arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar. Vit nýta m.a. eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag og arbeitt verður nógv við dokumentatión.

**Um teg**
Tú skalt vera áhugað/ur í at luttaka í spennandi avbjóðingum, kunna vísa áræði, ikki vera bangin fyri nýggjum tiltøkum og vera við til at útbyggja tað tværfakliga samstarvið við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligar eginleikar, so sum humor, greiða talu og gott arbeiðslag.

**Nærri fæst at vita** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a. við at venda sær til Súsanna Winther Poulsen, leiðandi ergoterapeut, tlf. 304500, lokal 5785 og 5786.

**Løn- og setunartreytir** sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 23. januar 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

---

TVØROYRAR KOMMUNA

# Almennu fundir

Tvøroyrar býráðs í 2006 verða:

| | |
|---|---|
| 10. jan. | 7. febr. |
| 7. mars | 4. apríl |
| 2. mai | 13. juni |
| 5. september | 10. oktober |
| 7. november | 5. desember |

Allir fundirnir verða kl. 17.00 í býráðssalinum.

**Tvøroyrar býráð**

---

**Landssjúkrahúsið**
FP-100 Tórshavn

# Endurlýsing

**Psykiatrisk verkætlan –**
**Sálarsjúk í arbeiðið innan psykiatriina**
**Hevur tú verið sálarliga sjúk/ur?**

Og kundi tú hugsað tær at verið við til at skapt størri opinleika um sálarliga sjúku í Føroyum við at brúkt títt sjúkuinnlit at hjálpt øðrum - og samstundis fingið útbúgving?

Psykiatriski depilin fer nú undir spennandi SB-verkætlan.
(SB stendur fyri starvsfólk v/brúkarafortreytum). Enn eru nøkur pláss eftir, við tað at pláss er fyri tilsamans 10 fólkum, ið hava kent sálarliga sjúku á egnan kropp. Hesi fara alt komandi ár, í róligum og tryggum umhvørvi at luttaka í viðkomandi, teoretiskari frálæru. Samstundis koma tey í hóskandi starvsvenjing.

Ætlanin við verkætlanini, sum hevur givið sera góð úrslit í øðrum londum, er at menna fyrrverandi sálarliga sjúk til at kunna virka í t.d. einum starvsfólkabólki á eini psyk. deild ella á einum bústovni. Har kunnu tey umboða sjúklingarnar út frá tí veruleika, at ongin kann skilja t.d. kenslur hjá einum sálarliga sjúkum betur enn ein, ið sjálv/ur hevur verið sjúkur.

Fyrimunirnir við starvsfólkum við brúkarafortreytum eru nógvir. Ikki bara kunnu hesi „tosa sama mál" sum tey sjúku, men tey kunnu eisini vera livandi dømi hjá teimum og teirra avvarðandi um, at tað ber væl til at koma styrkt uppundan aftur.

Heldur tú hetta ljóðar áhugavert, so er ikki at halda teg aftur! Send okkum „nakrar reglur", har tú greiðir frá, hvussu júst tínar dygdir kundu verið nýttar í einari starvsvenjing innan psykiatriska økið.

Starvsvenjingin er ólønt og teoretiska frálæran ókeypis. Um tú í løtuni fært fyritíðarpensjón ella forsorgarhjálp, varðveitir tú veitingina, meðan tú ert í starvsvenjing.

Umsókn, har tú skrivar um teg, tína sjúku og tankar um nýggja starvið, kanst tú senda til:

**SB Verkætlanin**
**Psykiatriski Depilin**
Att.: Æna Reinert
deildarleiðari fyri økispsykiatriina
Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er fríggjadagin hin 20. januar 2006 kl. 14:00. Eisini ert tú vælkomin at seta teg í samband við Bergtóru, samskipara og Fíu, SB-ara á tlf. 304500 lok. 4126 ella teldupost bhj@lsh.fo.

Vit gleða okkum at frætta frá tær!

---

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820